# Besta bókin fyri norðan

**VINNARIN. Besta norrøna bókin er "Oppdageren" eftir Jan Kjærstad úr Noregi. Tað varð semja um í eini dómsnevnd í Oslo í gjár. Bókin er ein avbjóðing og gevur okkum ríka lesigleði, sigur dómsnevndin. Føroyska umboðið í nevndini er Jógvan Isaksen**

MENTAN
*Birgir Kruse*

Norðmenn eru ernir. Eingin ivi um tað. At sigurin er uppiborin, eru teir heldur ikki í iva um. Vinnandi bókin er hin triða í eini røð, sum byrjaði fyri sjey árum síðani. Og rithøvundurin aftan fyri hetta megnar bókaverk, hevur aldri áður verið í uppskoti. Tað hevur undrað mangan norðmann, og í grein í Vikuskiftinum í dag hevur Jógvan Isaksen eitt boð um hví so er.

Jan Kjærstad er føddur í 1935 og varð fyrstu ferð fram sum rithøvundur við stuttsøgusavninum "Kloden dreier stille rundt" í 1980. Skaldsøgan "Opdageren", sum nú er virðislønt, er triði partur í einum høvuðsverki í norskum bókmentum, nú túsundárið rennir út, siga teir báðir norðmenninir Oskar Stein Bjørlykke og Hans H. Skei.

Eisini Jógvan Isaksen, dómsnevndarlimur og ummælari á Sosialinum, heldur Kjærstad verða truplan at koma uttan um. Ein upplagdur favoritturin, sigur hann í yvirlitsgrein í Vikuskiftinum ídag. Harafturat verður virðislønta bókin "Oppdageren", mett sum aðalluturin í tríbindsverki Kjærstads, og hesin rithøvundur er millum mest lisnu í øllum Norðanlondum.

Grundgevingin hjá dómsnevndini at lata Jan Kjærstad virðislønina fyri »Oppdageren« er soljóðandi: »Í skaldsøguni fylgja vit Jonas Wergeland á rannsóknarferð gjøgnum Noreg, ein ferð, sum samstundis tekur støði í nærmastu fortíð okkara. Frásøgustílur Kjærstads er framúr egin og nýskapandi og teksturin gevur lesaranum bæði stórar avbjóðingar og ríka lesigleði«.

Á norsku netsíðuni http://oslopuls.no ber til at lesa nærri um allar bøkurnar, sum vóru við og sanniliga eisini at ummæla tær. Netsíðan hjá Norðurlandaráðnum, sum er at finna á www.norden.org upplýsir eisini nærri um einstøku bókaverkini.

Jan Kjærstad fær bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins, sum er 350.000 krónur, handaða í Oslo hin 4. apríl.



*Jan Kjærstad fær bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins 2001 fyri skaldsøguna »Oppdageren«*

# Eftirtorv

**YVIRLIT. Tað var í 1962 at Norðurlandaráðið fyrstu ferð lat bókmentavirðislønina. Síðani hevur hon, virðislønin, vaksið seg stóra. Í 1985 vóru Føroyar fyrstu ferð við. Aktuella bókin hjá Oddvør er hin trettanda føroyska í hesum høpi**

MENTAN
*Birgir Kruse*

Bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins kann av sonnum sigast at verða okkara Nobelvirðisløn. Í hvussu er, tá vit tosað um bøkur. Og tað gera vit ofta á okkara leiðum. Tí her stendur bókmentunarliga traditiónin sterk. Her skulu fleiri enn nakrir Pokémonnar, at taka okkum av fótum.

Fyrstu ferð, møguleiki var at skjóta upp bókmentunarlig evni til hesa felags norrønu virðisløn, vóru so stór nøvn í uppskoti, sum William Heinesen, Karen Blixen og Halldór Laxness. Men Eyvind Johnson streyk við sigrinum. Tað var fyri bókina "Hans nådes tid".

Í 1965 fekk William Heinesen virðislønina, men dómsnevndin vildi hava hann at deila hana við svian Olof Lagercrantz. Og so varð. Kanska er lagna okkara laga soleiðis, at vit aldri skulu standa sigursvinnandi á einum einsamallum sigurspláss. Á ongum sinni er virðislønin síðani latin tvíbýtt.

Tað var í 1985, at føroyingar fyrstu ferð sýndu bókmentunarlig evni. Ikki tí, skrivað hevði verið og søgur høvdu verið sagdar á manna munni í øldir mangar. Góðar søgur, sterkar søgur. Eisini søgur, sum skrivaðu seg inn í miðeuropeiska søguarvin. Men hetta var árið, vit á fyrsta sinni megnaðu at trýna fram á norrøna pallin við egnum orðum.

Lagt varð fyri við Regini Dahl og savni hansara "Eftirtorv". Hóast heitið, ið frásigur sær alla æru, eingin vána byrjan. Tí árið eftir var føroyska uppskotið tikið til eftirtektar, og dómsnevndin kundi senda tey gleðiligu boð heim til Føroya, at vit høvdu vunnið. Ja, tað vil siga Rói, Rói Patursson. Í 1986 fekk hann bókmetavirðisløn Norðurlandaráðsins fyri yrkingasavnið "Líkasum".

Tey fylgjandi árini verða fimm menn skotnir upp. Jóannes Nielsen tríggjar ferðir, og teir tríggir Jens Pauli Heinesen, Gunnar Hoydal og Carl Johan Jensen tvær ferðir. Tóroddur Poulsen verður skotin upp ta einu ferðin, í 1996. Í fýra førum hevur eingin føroyskur rithøvundur verið skotin upp.

Í ár er so á fyrsta sinni mælt til, at ein føroysk kvinna fær bókmentavirðislønina. Oddvør Johansen við "Í morgin er aftur ein dagur". Trettanda føroyska bókin, ið skotin er upp at fáa stórstu bókmentavirðislønina á okkara leiðum.

At ein dagur er eftir fríggjadagin og trettandu føroysku bókina, ja tað fær norðmaðurin Jan Kjærstad at sanna. Tí eftir henda dag er Jan 350.000 krónur ríkari. Og týddur til og kendur á mongum fremmandum málum. Enn fleiri enn áður. Tí virðislønir er bæði eitt herðaklapp, men sanniliga eisini ein alneyðugur liður í marknaðarføring.

Hvat føroyskum máli og føroyskum rithøvudnum viðvíkur, mugu vit eisini ásanna, at norrøna bókmentavirðislønin sum hin fremsta er við til at økja um kunnleikan til føroyskar bókmentir og tað sum mentunarliga rørir seg herheima. Og gera tað ásjónligt fyri umheiminum. Og tað er ikki so lítið. Hóast við koma aftur sum av torvheiðum. Og aftur gjørdust eftirtorv.

Oddvør og allir menninir eiga tøkk uppiborna fyri at hava víðkað okkum sjónarringin.



*Regin Dahl var fyrsti rithøvundur, sum føroyingar skutu upp at fáa norrønu bókmentavirðislønina. Tað var 1985 fyri savnið »Eftirtorv«*



*Rói Patursson er einasti føroyingur, sum hevur fingið bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins. Tað var fyri yrkingasavnið »Líkasum« í 1986*



*Jóannes Nielsen er tann føroyingur, sum oftast hevur verið í uppskoti. Í 1988 fyri »Tjøraðu plankarnar stevna inn í dreymin«, í 1994 fyri »Kirkjurnar á havsins botni« og í 1999 fyri »Pentur«*



*Oddvør Johansen er trettandi føroyski rithøvundurin og fyrsta kvinnan, sum umboðar okkum, tá støða skal takast til bestu norrønu bókina*



VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Halgir W. Poulsen

**Svenning Borg**
*Vágur*

Í Sosialinum fyri 31. jan. ger tú viðmerkingar til eina møguliga loysing hjá Suðuroynni frá restini av Føroyum og heldur hetta vera skemt. Men hetta er ramasti álvari. Um tað ber til løgfrøðisliga, skal eg ikki gera meg klókan uppá, men roynast skal tað.

Eru vitandi um oyggj, sum hevur 8000 íbúgvar, ið hevur sjálvstýri, men ikki nærtil so gott grundarlag at byggja tilveruna á sum Suðuroyggin, sum við sínum stóru fiskigrunnum hevur at byggja á.

Tað búgva umleið 5000 fólk í Suðuroynni og skuldi tey klára hetta nógv betur enn nakar annar, um man hyggur at teimum møguleikum, sum Suðuroyggin átti at havt, um hon tekur loysing frá hinum oyggjunum.

Suðuroyingar vilja sjálvir sleppa at umsita tað ríkidømi, ið náttúrliga hoyrir Suðuroynni til, tað veri seg fiskiloyvir og oljuloyvir, og tað gerst best við loysing.

Um tað so verður ein »regiónsloysing«, so er tað í ordan. Avgerðina hvat skal henda á okra grunnum skulu suðuroyingar hava sjálvir.

At samanbera okur við Afrika má bara vera skemt.

# Meining

**Halda Olsen**

Undirritaða vil við hesum heilsa býráðnum og takka fyri, at tit eru so skilagóð at hava keypt Marinustøðina, sum liggur so sera væl fyri og kann brúkast til meira enn *eitt* sosialt endamál. Áðrenn eg sigi nakað um mínar tankar um brúk av bygninginum, vil eg eisini takka fyri vælvildina við Tilhaldinum, sum er til stóra gleði og gagn fyri mong av okkum. Rokni við, at tit hava hoyrt um fleiri, sum hava fegnast um hetta tiltak. Stóra tøkk.

Í $14\frac{1}{2}$ ár arbeiddi eg á Ellisheiminum og fekk drúgvar royndir í teimum árunum. Røddir hava verið frammi um, at tað hevði verið skilagott at býtt bygningin upp, soleiðis at hann bleiv brúktur til eldrabýli eins og til barnagarð. Við samhuga við øllum teimum, ið hava trupulleikar við at fáa børn síni ansað, so haldi eg ikki, at tað er tann besta loysnin. Tey flestu gomlu, sjálvt um tey eru góð við børn, orka tey ikki meira enn løtur í senn. Børn skulu hava loyvi at menna seg gjøgnum spæl, og vita vit, at viðhvørt stendst rættiliga nógvur gangur av tí, tað vil so vera. Tey flestu gomlu vilja hava tað friðarligt rundan um seg, og eru tað nógv, ið als ikki, av ymiskum orsøkum, tola ov nógv órógv. Mín meining er, at tað er ikki besta loysnin.

Eg vil koma við eini áheitan til politikararnar, áðrenn tit gera nakað sum helst: Kunnið tykkum væl og virðiliga um, hvussu fram skal farast. Tað eru nógv, ið hava innlit í støðuna, sum hon er í dag. Tað eru kommunulæknarnir, heimasjúkrasystrarnar og heimahjálparar, og ikki at gloyma stovnsleiðarar, sum ivaleyst hava royndir av, hvussu tað í flestu førum er best at byggja ein stovn upp. Sannroynd er, at tað, sum gomul fólk eins og børn hava fyri neyðini, er eitt trygt umhvørvi og góð fólk um seg. Loyvi mær at koma við einum hugskoti. Marinustøðini er ein stórur bygningur, vildi hildið, at tað átti at borið til at býtt bygningin í minsta lagi í tvær eindir. Kanska var ein deild fyri tey, sum eru í barndømi, og ein partur varð brúktur til t.d. vardar íbúðir.

Við bestu vónum og góð ynski við tiltakinum verða tit øll heilsað.




